


*Hetta kortið vísir á leið, hvar Arizona fór á land. Nærmasta stóra pláss er Þorlákshøfn*

Skiparin fór niður í kahúttina eftir bátakumpass og neyðrakettum, og hann fekk eisini hendur á nøkrum klæðum til sín sjálvs og aðrar. Eingin av frívaktini fekk nøkur klæðir við. Tað var eingin tíð at missa, og vit sluppu av skipinum í seinastu løtu, áðrenn tað fór at bróta inn á dekkið.

Tann seinasti maðurin mátti fáa sær renningarlop at leypa í bátin. Hann hevði verið í lugarinum og fingið hendur á nakað av oljuklæðum hjá manningini.

Átta mans vóru longu við árarnar, meðan hinir 12 menninir vórðu býttir millum forskutin og afturskutin í bátinum. Her var ríkiliga trongligt til so nógvar vaksnar mans. Báturin fleyt tungt í sjónum, men tíbetur høvdu vit eina lítla jollu uppá sleip. Skiparin helt, at tað kundi hent, at vit fingu brúk fyri henni.

## Í bjargingarbátunum

Tað var óhugsandi at leggja at inni á landi, sum brimið var. Vit kendu heldur einki til, hvussu út sá inni í fjøruni. Sum brimið var, hildu vit okkum frá at kanna hetta, meðan myrkt var.

Vit róðu tí vestureftir tvørs av víkini. Vindurin vaks við kavaroki og verri sjógvi. Tað gekk seint at rógva, og jollan, sum hekk afturút seinkaði eisini ferðini.

Bjargingarbáturin var eitt áttamannafar, og hann var sera sjógóður. Tað var eisini galdandi fyri jolluna, sum var bygd í sama sniði.

Tá hendi tað, at fýra av manningini bjóðaðu sær til at fara í jolluna, og skiparin loyvdi hesum. Í jolluni var eisini ivaleysa trongt til fýra mans, men tað rúmkaði um hjá okkum.

Onkuntíð kláraði eitt sindur upp, so vit sóu vitan á Selvogsnesi ikki langt burtur. Hesar løtur høvdu vit nýtt høvið at senda upp neyðrakettir. Tá vit høvdu sent tríggjar var eingin eftir. Vit fingu seinni upplýst, at á vitanum høvdu teir ikki sæð nakað.



*Hetta er ein íslendskur bóndagarður, sum helst minnir um garðin, hagar manningin á Arizonu bjargaði sær*

Millum klokkan 2 og 3 hoyrdu vit dunkið av einum motorskipi. Tað hevði motor av sama slag, sum føroysk skip nýttu fyrstu árini. Stutt eftir hómaðu vit eitt skip fara framvið okkum. Vit róptu hart og leingi um hjálp, men teir hoyrdu okkum ikki, helst vegna gangin frá motorinum. Hetta var lítið hugaligt, og vit hoyrdu ikki onnur skip hesa náttina.

Seinni fór vindurin í ein útsynning við hørðum støðugum kavastormi. Aldan gjørdist høg, eftir at vit høvdu róð í fýra tímar undir ringum umstøðum móti vestanvindi og aldu.

Vit høvdu eingi beinleiðis brot inn í bátin, men kortini skolaði sjógvur inn frá bæði borð. Tveir mans høvdu nóg mikið við at oysa alla tíðina. Menninir skiftust at rógva og at oysa. Vit royndu eisini at blaka okkum fyri at fáa eitt sindur av hita í kroppin hóast náttarkuldan. Sjálvt um vit høvdu fingið nakað av oljuklæðum við í bátin, var hetta ikki nógv mikið til allar, so menn vóru gjøgnumbloyttir. Men tað var tó ikki tann stóri munurin á teimum við og uttan oljuklæðir. Tað avgerandi var, at menninir vóru í føroyskum undirklæðum, og hesum kunnu vit takka fyri, at eingin fekk varandi mein av kuldanum. Tað er eisini er veruleiki, at ullint klæði verma eins væl, um mann var ígjøgnum.

## Ring hundavakt

Hundavaktin hevði verið trupul á ein hvønn hátt. Vit kendu okkum eisini heilt maktarleysar av møði og mótloysi. Tað tyktist eisini, sum at tíðin stóð í stað, og vit byrjaðu at føla okkum svangar og tystar. Tað var einki etandi ella drekkandi í bátinum, og hetta var heldur ikki fyriskipað útgerð í bjargingarbáti. Men hann var sjógóður, sum hetta slag av bátum kann vera, hóast jolluna, sum hekk afturút, og sum var eitt sindur til fortreð.

Tá ið tað lýsti, høvdu vit trupulleikar við at halda okkum vaknar. Tað var mestsum eitt eiti, at vit róðu. Tað gekk meira bakk enn fram, og vit kláraðu so dánt at halda bátinum upp móti, so hann ikki kom at liggja tvørtur av vindinum.

Soleiðis gingu enn tríggir tímar, eftir okkara tykki til onga nyttu. Veðrið var óbroytt. Eingin segði nakað, uttan tá ið onkur bjóðaði sær til at loysa av at oysa ella rógva.

Meðan tað sá ringast út, batnaði veðrið millum sjey og hálvgum átta, og tá lívgaðu vit upp. Eina løtu seinni sóu vit vestara vongin á víkini.

Aftaná eitt korter kendu vit aftur landslagið hinumegin. Tá vísti tað seg, at hetta var júst lendingin hjá bóndanum í Herdisarvík. Vit kundu rokna út, at vit vóru førdir hagar av streyminum frá tí opna havinum.

## Vit royna at koma í land

Hóast vindurin var minkaður, var framvegis ringur sjógvur, so vit bíðaðu eina løtu eftir at royna at fara á land. Vit vónaðu, at kanska fóru fólkini á garðinun at síggja okkum, men hetta merktu vit kortini einki til.

Hóast vandan, sum var við royna at sleppa okkum á land, vildu vit royna løgir til hetta millum brotini. Tað vóru nakrir av monnunum, sum høvdu royndir frá brimplássum, har teir búðu í Eysturoynni, og kundi hetta koma okkum til gagns.

Nú skuldi tað standa sína roynd. Tað avgerandi var, at vit fyrireikaðu okkum væl. Tað ráddi um at koma so tætt sum gjørligt at teimum stóru brotunum, sum so kundu skola okkum uppá land. Jollan við teimum fýra monnunum skuldi royna fyrst. Teir fóru við einum broti og komu beint inn á sandin. So róptu teir út til okkum í tí stóra bjargingarbátinum um at koma beinanvegin. Men hetta var lættari sagt enn gjørt. Her var rættiliga útgrunt, og tí kundi væl hugsast, at báturin fór at taka botn á vegnum inn. Hendi hetta kom bátur at venda tvørur og fór tá at koppa, og tá kundu vit vera um ein háls.

Nú ráddi bert um at bíða, til tað varð kyrt millum tvey brot. Hetta vísti seg at bera til, hóast báturin var trupul at stýra, og menninir við árarnar vóru púra fokkaðir. Hetta var ein kapprógving við brotini, sum komu aftaná frá, men báturin kom tó óskaddur upp á sandin. Síðan brúktu vit tær kreftir, sum vóru eftir at hála bátarnar niðanfrá, so teir vóru leysir av briminum.

## Bóndagarðurin í Herdisarvík

So stóðu vit har í einum trunka, meðan ein av monnunum bað eina stutta takkarbøn fyri bjargingina.

Síðan fóru vit í gásagongd gjøgnum skalvarnar niðan til bóndagarðin í Herdisarvík, sum lá nakrar hundrað metur frá strondini. Hóast hetta var stuttur teinur, var tað tungt fyri okkara stívu bein.

Beint við bóndagarðin stóðu nøkur ross aftanfyri eitt úthús. Tey tóku til beins og hava helst ræðst hesar ókunnugu menninar so tíðliga á degnum. Vit loyvdu okkum at gloppa hurðina til úthúsið, og her jarmaði seyðurin av svongd.

Fólkini á garðinum vóru ikki uppkomin, hóst klokkan var næstan níggju. Vit bankaðu á úthurðina á sethúsunum. Hon var læst, og tey hoyrdu einki har inni. Ikki fyrr enn vit bankaðu á eitt vindeyga vísti bóndin seg. Hann varð sera bilsin og illa við at síggja eina heila skipsmanning uttanfyri sovikamarsgluggan.

Vit hoyrdu, at hann rópti hini í húsinum og bað tey koma upp beinanvegin. Sjálvur opnaði hann hurðina beinanvegin og bjóðaði okkum vælkomin innar. Hann bað orsaka, at hann hevði sovið yvir seg. "Vit vóru uppi í nátt fyri at bjarga nøkur av djórunum í kavastorminum," segði hann.

Bóndin kendi beinanvegin fleiri av okkum aftur, frá tí hann hevði vitjað umborð dagin fyri. Hann var eisini bilsin um, at vit hóast alt vóru so frægt fyri eftir alt, sum vit høvdu verið út fyri í hesum ringa veðrinum.

## Full goymsla av klæðum

Bert tað at fáa tak yvir høvdið